# Smádrongur bitin í andlitið av hundi

**Ein trý ára gamal drongur á Økrum verður merktur fyri lívið, eftir at ein hundur leyp á hann og beit hann illa í andlitið**

LEYSGANGANDI HUNDAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


*Hesin trý ára gamli smádrongurin av Økrum fór í sínum sakloysi yvir til ein hund at klappa honum. Men hundurin leyp á og beit hann, so at hann fekk ein skurð um alla høkuna og langt upp eftir kjálkanum*

Hevði tað ikki verið tað stóra plástrið, sum gongur eftir allari høkuni og langt upp eftir vinstra kjálka, hevði tað ikki verið so nógv at lagt merki til hjá hesum trý ára gamla smádronginum, sum stendur í gongini við einum lítlum bili í hondini, tá ið vit lata úthurðina upp.

Hann er róligur og blíður og eitt sindur smæðin. Men tá ið vit so hava sitið eina løtu, sigur hann spakmæltur: Hundurin beyt meg!

Jú, tað er meiri enn so, enn at tað framvegis situr í hinum, tað sum honum var fyri tá ið hann mikudagin var farin ein túr við dagrøktarmammuni.

Og hvørja ferð, hann hyggur í spegilin, so leingi hann livir, fer hann at verða mintir um tann mikudagin 13. november, 2003, tá ið hundur brádliga leyp í andlitið á honum og beit.

Um dagarnar er hann í dagrøkt í Sumba og hendan mikumorgunin vóru nakrar dagrøktarmammur og nøkur børn farin ein túr í Sumba.

Brádliga kemur ein hundur úr einum bilskúri ella undan einum lastbili, ongin sá rættiliga, hvaðani hann kom.

Forvitin og meinaleys, sum smábøn eru, fór hesin trý ára gamli og ein genta, sum eisini var í dagrøkt, yvir til hundin at klappa honum, áðrenn dagrøktarmammurnar varnaðust.

Men tá ið drongurin so bukkaði seg niðuryvir hundin, kom rovdýrið í hann sum eitt skot og hann høgdi til, uttan ávaring.

Drongurin fekk ein langan skurð eftir vinstra kjálka og eftir allari høkuni. Serliga er høkan illa farin, tí har var sárið so djúpt, at fingurin fekst í tað.

Drongurin varð alt fyri eitt fluttur á Suðuroyar sjúkrahús, har hann varð seymaður aftur. Sárini vóru so stór, at neyðugt varð at doyva hann burtur, ímeðan seymað varð við sjey ella átta stingum í høkuni og í kjálkanum. Hann lá so á sjúkrahúsinum um náttina og slapp heim aftur dagin eftir.

Mamman sigur, at sárini eru so greflig, at tað slepst ikki undan at kemur at ganga við arri í andlitinum alt lívið.

Hon sigur, at hetta hendi so knappliga, at tað var onki, dagrøktarmammurnar kundu gera fyri at forða fyri tí.

Hon heldur, at hetta er ein óhugnalig hending.

– Tá ið ein hundur legst á ein trý ára gamlan óvita, kann alt henda, tí eitt so lítið hevur ongan møguleika at verja seg.

– Men tað sær út til, at hundar skulu sleppa at ganga leysir, sum teir vilja. Tað er sum um at hundar hava somu støðu í Føroyum, sum tey heilagu neytini hava í India: Teir skulu ganga sum teir vilja og teir skulu ikki rørast.

Leggjast kann afturat, at eftir hendingina varð hundurin skotin.

Hetta høvi kann so brúkast til at staðfesta einaferð enn, at hundar hava ikki loyvi at ganga leysir og at tað er ábyrgdarelyst at lata teir gera tað. Teir eru ikki annað enn dýr og tað kunnu verða heilt tilvildarligar støður, sum føra til, at teir leggja á fólk. Og smábørn duga ikki at hugsa so frægt sum tað, at tey skulu ikki nærkast fremmandum hundum.

Løgreglan sigur, at tað er avmarkað, hvat hon kann gera við leysgangandi hundar.

Í slíkum føri, tá ið hundar bíta, er altíð rætt at melda, tí endurtekur tað seg við sama hundi, kann fútin áleggja, at hundurin verður skotin.

## Feldur upp á seks tíma regluna

**Tað nyttar onki at rýma undan einum ferðsluóhappið og so fortelja løgregluni, at tú hevur drukkið aftaná. Tað mátti tveir bilførarar sanna hetta vikuskiftið**

Hetta vikuskiftið var eitt ferðsluóhapp í Havn, har bilførarin verður skuldsettur fyri at koyra við kenning, hóast hann ikki varð tikin á staðnum.

Leygarkvøldið rendi ein bilur á Yviri við Strond. Tá ið løgreglan kom á staðið, var bilførarin rýmdur. Men løgreglan tók hann seinni.

Tá metir løgreglan at hann var so ávirkaður av rúsdrekka, at hann verður skuldsettur.

Tað er nevniliga ein regla til, sum vanliga nevnist seks tíma reglan.

Hon sigur, at tann, sum er uppi í ferðsluóhappi, hevur ikki loyvi at drekka teir fyrstu seks tímarnar eftir óhappið. Ger hann tað, telur tað sum um at hann eisini hevði drukkið, tá ið sjálvt óhappið hendi.

Og hendan reglan feldi bilføraran, sum koyrdi bilin Yviri við Strond.

Leygarkvøldið var eisini eitt ferðsluóhapp á Sandi. Men bilførarin hevði skund, tí hann skuldi við ferjuni til Havnar so hann boðaði heldur ikki frá óhappinum.

Men tá ið hann kom á Gomlu Rætt, stóð løgreglan fyri honum og hann verður eisini skuldsettur fyri at koyra við kenning.

Leggjast kann afturat, at bilførarar, sum eru orsøkin til eitt ferðsluóhapp, skulu boða frá.

### Vanligt vikuskiftið

Annars var talan um eitt vanligt vikuskiftið hjá løgregluni í Havn. Trýggir mans gistu í brummuni, tí teir vóru so fullir, at teir klára seg ikki sjálvar.

Ein fullur maður, elvdi til skaða á ein bil í miðbýnum, tá ið hann sparkaði hann. Hann viðgekk seg sekan og rindar skaðan aftur sjálvur.

Ein vørubilur varð eisini stolin. Í bilinum var nógv virðismikil útgerð til edv og annað. Men bilurin varð funnin aftur í øllum góðum uti á Argjum beint eftir at hann var eftirlýstur í Útvarpinum sunnudagin.

## Norskur ráðharri vitjar Føroyar

**Norski ráðharrin í heilsumálum kemur til Føroyar mitt í viku og tá fer Bill Justinussen at tosa við hann um samstarv**

RÁÐHARRAVITJAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


*Fríggjadagin kemur norski ráðharrin í heilsumálum til Føroya at vitja Bill Justinussen. Teir báðir fara at tosa um samstarv ímillum Føroyar og Noreg*

Síðst í vikuni kemur norski ráðharrin í heilsumálum til Føroya at vitja í nakrar dagar.

Í Føroyum skal hann hitta føroyska starvsbróður sín, Bill Justinussen, landsstýrismann í heilsumálum.

Norski ráðharrin, Dagfinn Høybråten, steðgar her til sunnudagin, tá ið hann fer avaftur landinum.

Hann er ein av næstu monnum Kjeld Magne Bondevik og summi meta, at hann verður næsti formaðurin í Kristelig Folkeparti í Noregi

Á fundinum ímillum bill Justinussen og Dagfinn Hoybråten, fara teir báðir starvsbrøðurnir at tosa um ymisk viðurskifti, ið kunnu vera av felags áhuga.

Bill Justinussen sigur at hann fer at tosa við norska ráðharran um tað ikki ber til at fáa eitt samstarv í lag ímillum Føroyar og Noreg. Tað, Bill Justinussen serliga hugsar um, er eitt samstarv um fólkaheilsupolitikk.

– Í Noregi føra tey ein virknan politikk fyri at fremja fólkaheilsuna. Tey hava eisini stovnar, sum fáast við gransking við tí endamáli at fremja fólkaheilsuna.

Hinvegin hava vit avmarkaða orku og møguleikar í Føroyum til gransking og til at føra ein virknan fólkaheilsupolitikk.

Vit hava heldur ongan fólkaheilsustovn, ella annan stovn, sum hevur til arbeiðis at fremja fólkaheilsuna.

– Vit hava Fyribyrgingarráðið, men tað er alt mannað við fólkum, sum hava annað starv sum høvuðsstarv.

Bill Justinussen sigur, at tað er eisini ein spurningur um tað hevði borið til at broytt grundarlagið undir Fyribyrgingarráðnum, so at tað bleiv meiri at meta sum ein fólkaheilsustovnur.

– Tað eg fari at tosa við Dagfinn Hoybråten um, er, um tað ikki hevði borið til eisini hjá føroyingum at fingið ágóðan av teirri gransking, sum fer fram í Noregi á hesum øki og ágóðan av teimum tiltøkum, sum teir seta í verk.

– Tað er ikki yvir at dylja, at norðmenn eru so virknir á hesum øki, liggja teir inni við eini vitan, sum hevði verið torfør, fyri ikki at siga ómøgulig hjá okkum at útvega okkum sjálvi.

Leygardagin hevur Miðflokkurin landsfund í Norðurlandahúsinum og har fer norski landsstýrismaðurin eisini at halda røðu.

# ítróttur

Nr. 219 • týsdagur • 18. november 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Tobbi fer at hjálpa VB


*Torbjørn Jacobsen, fólkatingslimur, hevur eina avgjørda fatan um, hvønn týdning útlendskir leikarar hava fyri føroyskan ítrótt*

**Fólkatingslimurin hevur biðið um fund við Bertel Haarder, integratiónsministara, um aktuella útlendingamálið**

ÚTLENDINGAMÁLIÐ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Enn er endaliga avgerðin ikki follin í málinum um, hvørt útlendsku leikararnir hjá VB hava loyvi at vera í landinum ella ikki. VB fekk fríggjadagin tilsøgn um eina kæruviðgerð, og so leingi sum kæran verður viðgjørd, sleppa tær báðar hondbóltskvinnurnar framvegis at verða verandi í landinum.

### Atlit mugu takast

At meta eftir fyrru avgerðini, so hevði danska útlendingastýrið tó ikki stórvegis hug at taka støðuna í júst føroyskum kvinnuhondbólti og VB við í málsviðgerðini, og spurningurin er so, hvørt hetta í størri mun kemur at telja við, nú støða skal takast í málinum av nýggjum.

Men í øllum førum tykist VB nú at fáa hjálp í aktuella málinum.

Torbjørn Jacobsen, fólkatingslimur, hevur nevnliga biðið um fund við Bertel Haarder, integratiónsministara, og tó at hann enn ikki hevur fingið nakað svar hesum viðvíkjandi, so æltar Tobbi sær at gera sítt til, at málið kann loysast uttan at leikarar skulu sendast av landinum.

- Fríggjadagin sendi eg bræv til skrivstovustjóran í integratiónsministeriinum, har eg bað um fund við Bertel Haarder. Nú hevur vikuskiftið jú verið, so enn havi eg ikki hoyrt nakað aftur, men eg ætli mær so at rykkja eftir hesum, beint sum eg komi niður mánadagin, segði Torbjørn Jacobsen, tá vit fingu orð á hann sunnukvøldið.

- Tað, sum eg fyrst og fremst ætli mær, er at greina málið út. Ikki bara viðvíkandi VB men viðvíkjandi føroyskari ítrótt yvirhøvur. At styrkja sær um liðini við útlendskum leikarum hevur í fleiri ár verið siðvenja hjá føroyskum ítróttarfeløgum, og uttan at vita nakað um einstøku dømini, so er jú væl hugsandi, at onnur feløg kunnu standa við somu trupulleikkum, sum VB ger tað í dag. Tað skal jú hugsast um, at nevndirnar aloftast eru mannaðar við fólki, sum eisini hava sítt at hugsa um í gerandisdegnum, og tey hava tí hvørki tíð ella møguleika at seta seg neyvt inn í øll viðurskiftini hesum viðvíkjandi. Sjálvur havi eg verið vitni til einstøk mál, har samskiftið um innferðar- og arbeiðsloyvi hevur kravt einar 40 korrespondancur aftur og fram, og tað sigur seg sjálvt, at tað er lætt at stígur kemur í, sigur Torbjørn Jacobsen.

### Politikkur í málinum

Sambært Torbjørn Jacobsen, so er ein partur av trupulleikanum í øllum málinum tann politikkur, sum danska stjórnin hevur sett sær fyri at føra.

- Dansk Folkeparti er jú ein partur av stjórnini, og tey hava í øllum førum sínar avgjørdu meiningar um innflytarapolitikkin. Kanska er ikki hent so nógv, sum tey kundu hugsa sær á økinum, men ein máti at bremsa uppá er at seinka málsviðgerðini, og tað er tað, sum tykist henda í løtuni. Verður málsviðgerðin og tung at fáast við hjá vanliga borgaranum, so sigur tað seg sjálvt, at fleiri setast aftur.

- Men júst støðan við ítróttarfólkum er eitt sindur øðrvísi. Og tað er nakað sum eigur at verða tikið upp politiskt. Kanska við slíkari kunngerð, sum danir hava, ið loyvir einari meira smidligari skipan, tá tosað verður um m.a. ítróttarfólk. Tað er so í øllum førum nakað, sum ikki skuldi alt ov langa tíð at greitt, um viljin er til tess.

Umframt politiska virkið sítt, so telist Torbjørn Jacobsen eisini millum teir mongu føroyingarnar, sum hava ein brennandi áhuga fyri ítrótt. Í gerandisdegnum er hann íðin GÍ-viðhaldsmaður, og avrik hansara á fimtu-deildarliðnum hjá NSÍ verða ofta havd á munni har um leiðir, og hartil er okkurt gullmerki í hondbólti eisini í savninum. Ti er einki løgið í, at hann eisini hevur sína fatan av, hvønn týdning ítøkiliga málið hevur fyri føroyskan ítrótt.

- Fyri mær er eingin ivi í so máta. Skulu bygdarfeløgini hóra undan, sum kunnu tey ikki bara satsa upp á sínar egnu. Rekrutteringsgrundarlagið er heilt einfalt ikki tað sama í eitt nú Vági sum í Havn. At styrkja um hópin við frægum útlendskum leikarum gevur teimum møguleikan at vera við í toppinum, og tað er ov galið, um alt teppið soleiðis skal skrykkjast undan teimum, bara tí ein málsviðgerð í útlendingastýrinum absolutt skal ganga somikið seint fyri seg, sigur Torbjørn Jacobsen at enda.

## Fleiri søgdu løgregluni frá

ÚTLENDINGAMÁLIÐ
*Jákup Mørk*

Tað hevur undrað fleiri, at VB varð fyrsta felagið, sum varð valt burtur úr teimum trimum, sum vórðu kannaði í samband við skrivið hjá VÍF viðvíkjandi útlendingum. Ikki minst tí tað gekk rímiliga lang tíð, frá teirri løtu, at VB varð kannað, til løgreglan – mest sum í eini handavend - hugdi at loyvunum hjá leikarunum úr Neistanum og Stjørnuni.

Umframt skrivið frá VÍF, so hevur ljóðað, at VB eisini varð meldað fyri nýtsluna av útlendskum leikarum. Vit settu okkum mánadagin í samband við Lindu Hesselbjerg, sum ivaleyst man hava verið mest umrødda starvsfólkið hjá fútanum hesa seinastu vikuni, men hon kundi hvørki vátta ella avsanna, um hesi tíðindi vóru sonn.

- Tá talan er um konkretar málsviðgerðir, so fái eg ikki nevyt úttala meg um, hvat er farið fram. Tað einasta eg kann siga í hesum málinum er, at talan hevur verið um fleiri ávísingar, sigur Linda Hesselbjerg um málið.

Sostatt váttar hon ikki, at nakar beinleiðis hevur meldað VB, men hinvegin staðfestir hetta eisini, at tað ikki bert er skrivið frá VÍF, sum hevur ligið sum grund fyri kanningunum hjá løgregluni.

Annars sigur Linda Hesselbjerg, at orsøkin til, at løgreglan í løtuni ikki ger meira við málið er, at tey fyrst vilja hava boð um, hvat politiski viljin er í hesum.

- So leingi verandi lóggáva er galdandi á økinum, so mugu vit handla eftir hesari. Er vilji til at broyta tað politiskt, so handla vit sjálvandi eftir nýggjum reglum, tá hesar koma í gildi. Í hesum førinum hava vit kannað málini, og úrslitið av hesum arbeiði er lagt fyri útlendingastýrið. Meira enn tað er okkara leiklutur ikki, staðfestir Linda Hesselbjerg at enda.

Sum tað framgongur aðra staðni á síðuni, so er nú eisini líkt til, at politisk stig verða tikin í málinum, og fram til tá fer løgreglan í øllum førum ikki víðari við málinum.